lívdin
- í lívd hins hægsta

Februar 2007

Tíðindi Kunning Lýsingar Skráir

# Bønarskúli týskvøld í Lívdini



Flestu okkara stríðast við grundleggjandi spurningar um bøn og vilja Guds. Hví skal eg biðja? Hvat er bøn? Hvussu hoyri eg Gud tala til mín? Hví skal eg biðja saman við øðrum? Hevur Gud áhugað fyri lívi mínum? Hvussu skal eg brúka lív mítt? Hvat er vilji Guds við lívi mínum? Hví svarar Gud ikki bønum mínum við tað sama?

Ein av stóru avbjóðingunum, sum vit liva við í dag – og sum vit ikki sleppa undan – er, at alt skal ganga so skjótt sum møguligt. Tað, sum eg skal hava í morgin, skuldi eg helst havt gjørt í gjár. Um eg bíði 10 sekund ov leingi á alnótini, so gerist eg argur og vil hava eina størri og skjótari teldu. Um bíðirøðin í Burger King ella Bónus gongur ov seint, hyggi eg at klokkuni og gerist argur inn á tann, sum situr við kassan – tí eg havi ikki tíð. Vit vilja hava bestu dygd og skjótastu ferð, men vilja gjalda so lítið sum gjørligt fyri tað. Stóri vandin er tann, at hesin hugburður og skundur smittar yvir á mítt andaliga lív. Bønarlívið er ikki longri enn at senda Gudi eitt SMS, og vit rokna við svari aftur við tað sama. Vit investera lítið, men vænta nógv.

Hetta eru spurningar og hugburðir, sum vit øll stríðast við. Men hví ikki hjálpa hvør øðrum at tosa opið um hesar spurningar og ærliga ásanna okkara hugburð til bøn? Hetta er ein av ætlanunum við bønarskúlanum í Lívdini. Vit fara á týskvøldsmøtunum í 2007 at tosa um bøn, og hvussu vit kunnu læra at biðja rætt. Bøn er ikki ein aktivitetur, men ein lívsstílur – ein alneyðugur partur av lívinum hjá tí trúgvandi. Bøn okkara er, at Gud skal svara nógvum av okkara spurningum, og at hugburður okkara til bøn broytist, sum vit fara at læra, hvat Bíblian sigur um bøn, og sum vit luta opið og ærliga, hvussu vit liva okkara bønarlív.

Sum ein regluligan part av bønarskúlanum fara vit eisini at hava serstøk lovsongskvøld, har Anna Håberg og onnur fara at læra okkum týdningin av tilbiðjan í tónleiki og sangi sum ein part av gerandisdegi okkara.

Eg fari persónliga at heita á tykkum at koma á bønarskúlan í Lívdini hvørt týskvøld (uttan tá húsbólkakvøld er) kl. 20:00 til 21:30. Aftaná verður ein góð samfelagsløta.

*Jógvan Zachariassen*

**Minnist til at siga okkum frá!**

Vit heita á øll í samkomuni at siga okkum frá, um tit hava okkurt, sum tit vilja fáa við í faldaran sum t.d. børn, ið verða fødd, brúdleyp, gullbrúdleyp o.s.fr.

Í sambandi við rundar føðingardagar skriva vit ein stubba um fólk í samkomuni, sum fylla runt ella hálvrunt frá 50 og uppeftir.

Teldupostadressan er: faldarin@livdin.fo

## Eg skal svara tær



Jeremias 33:3 – „Rópa til Mín, og Eg skal svara tær, og Eg skal kunngera tær tað, ið stórt og ófatandi er, slíkt sum tú kennir ikki!“

Harrin lærdi meg tríggjar sannleikar um bøn frá hesum undurfulla versi:

1. Um vit BIÐJA... „Rópa til Mín...“ 2. So skal Hann SVARA... „Eg skal svara tær...“ 3. Og geva KRAFT! „Eg skal kunngera tær tað, ið stórt og ófatandi er.“

Einki stórt fer at henda í lívi okkara og í lívi samkomunnar, fyrr enn vit læra at boyggja knø okkara og rópa til Harran. Tá ið vit rópa, fer Gud til verka fyri okkum. Tá Gud fer til verka, gevur Hann okkum ikki bert „turra keks og flótt vatn“. Nei, Hann ger tað, ið vit ongantíð høvdu kunnað ímyndað okkum, Hann gjørdi.

Latið okkum hoyra orð Harrans, sum saman við Jeremiasi rópar á okkum um at søkja Hann í bøn, og vit skulu standa undrandi um alt tað, ið Gud fera gera í okkara lívi og í Lívdini.

*Jógvan Zachariassen*

# Vinir í Lívdini

## Tillukku við hjúnabandinum

### Malan og Viggo gift

4. august 2006 giftust í Herning Kirke Malan Dahl-Jacobsen úr Havn og Viggo Vibe Grevsen úr Herning. Fleiri av familjuni fóru úr Føroyum til hátíðarhaldið og brúdleypið.

Malan og Viggo búgva í Herning.



### Sanna og Petur gift

5. aug. 2006 giftust Sanna á Borg av Argjum og Petur Háberg úr Hoyvík.

Sanna og Petur búgva í Keypmannahavn, har tey lesa.



---

## Kærleiki til tað síðsta



Leygardagin 10. februar heldur danin Steen Palmqvist, psyko- & familjuterapeutur, skeið fyri samkomuni undir heitinum „Kærlighed til sidste blik“.

Steen Palmqvist sigur m.a. soleiðis: „Kærlighed er egentlig grundlaget for hele vores eksistens – og vi har meget brug for at mærke den i vores liv – og ikke mindst i vores ægteskab. Uden kærlighed mister livet sine mange farver. Gud har skabt kærligheden sådan mellem ægtefæller, at den kan forblive levende i et langt ægteskab – ja ikke kun levende, men sådan at den udvikler sig positivt hele livet igennem.

Det kommer imidlertid ikke af sig selv – den skal 'slides på' for at blive stadig stærkere. Her er det nødvendigt med en aktiv treklang af romantik, beslutning og intimitet. Vi må derfor være opmærksomme på disse tre elementer i ægteskabet.“

Steen arbeiðir í Føroyum í løtuni fyri Agapefelagsskapin.

Skeiðið verður frá 13.00-16.30 á Brekku 3.

## TILTØK Á BREKKU 3

(bygningurin aftan fyri MBM)



Undirvísing, bøn og bønarskúli — týskvøld kl. 20.00

| | |
|---|---|
| 6. feb. | Evni: Gud er mentur. Talari: Jógvan Zachariassen. |
| 11. feb. | Evni: „Vanar, sum styrkja bønarlív okkara“. Talari: Jógvan Zachariassen. |
| 20. feb. | Húsbólkar. |
| 27. feb. | Evni: „Bøn um ávøkst“. Talari: Jógvan Zachariassen. |

Bønarløta fyri ung — mikukvøld kl. 18.00

Ungdómsmøti — fríggjakvøld kl. 20.30

## Frá sunnudagsskúlanum

Sunnudagsskúlin sóknast eftir fólki til at undirvísa børnum. Hevur tú hug at vera við í hesi týdningarmiklu tænastu, hvørs endamál er at vinna børn og ung fyri Harran, kanst tú venda tær til Beintu Áargarð á tel. 312655 ella teldupost: aargard@kallnet.fo

Í sambandi við at sunnudagsskúlin heldur til í fimleikarhøllini, verður gjørt vart við, at børnini ikki mugu vera inni í høllini í skóm. Tí kann tað vera skilagott at hava okkurt heitt at fara í til føturnar. Gólvið kann vera eitt sindur kalt.

## Frá ljóðbólkinum

Tørvur er á fólki til ljóðbólkin í Lívdini. Áhugað kunnu venda sær til Árna Hansen, tel. 229894, ella Svend Åge Drewsen, tel. 210328.

## Ein biðjandi samkoma

- Bøn og tilbiðjan er ein týðandi partur av endamálsorðingini.
- Bøn er altumráðandi í visjónum samkomunnar fyri tænastuna og trúboðanina.
- Bøn verður sett fram sum eitt av høvuðslívsvirðunum í samkomuni.
- Øll verða lærd um týdningin av at vera persónliga við í bønarlívinum í samkomuni.
- Dentur verður lagdur á týdningin av bøn, tá nýggir málsetningar skulu setast og røkkast innan øll øki.
- Seta bøn og tilbiðjan sum hægsta mál fyri alla samkomuna.
- Læra, at bøn er stórur partur av peningaviðurskiftunum í samkomuni.
- Vísa á bøn sum eina serstaka andaliga gávu at nýta í samkomuni.
- Útvega tilfar sum motiverar og skapir bøn í samkomuni.
- Læra, at tilbiðjan og lovsongur er bøn og tilbiðjan, sum samkoman syngur í felag.
- Eggja samkomulimunum til at hava eitt sterkt persónligt bønarlív.
- Rokna við, at allir tænastufundir, húsbólkar, nevndarfundir, elstafundir, tænastuleiðarafundir o.s.fr. brúka minst 1/10 av tíðini í bøn.
- Læra um bøn frá talarastólinum, evnisleygardøgum, verkstovum og øðrum samkomufundum.
- Eggja allari samkomuni til at biðja alment – eisini ung og børn – bæði á almennum møtum, ungdómsmøtum og í sunnudagsskúla.
- Leggja dent á bøn við lesnaði, sum samkomuni hoyrir til.
- Seta leiðsluni og tænastuleiðarum høg bønarkrøv.
- Planleggja felagsbøn inn í vikuligar, mánaðarligar og aðrar aktivitetir.
- Læra at biðja á ymiskan hátt á okkara vikuligu bønar- og tilbiðjanarmøtum.
- Samkomuleiðarar biðja saman við øðrum samkomuleiðarum úr øðrum samkomum.
- Bønargongur í grannalagi, bygd, bý og landi.
- Søkja Heilaga Andan um vísdóm at biðja rætt í øllum tænastum og tiltøkum.
- Vera við til alheims bønardagin (hvítusunnudag).
- Tað skal vera ein vanlig sjón at síggja samkomulimir í bøn hvør fyri øðrum í samkomuni og aðrastaðni – bæði sjónliga í samkomuni og heima ella gjøgnum telefon.

Vit mugu fata, at bøn er ein samtala við Tríeindina, har Gud svarar øllum tí, sum Heilagi Andin leggur okkum á hjarta at biðja í Jesusar navni eftir vilja Faðirsins inn í okkara lív, familjur, samfelag, land, grannalond og alheimin.

# Bókaummæli

## Bøn forandrer

Eggjandi og praktisk bók um bøn, og hvussu Gud kemur nær gjøgnum bøn við Síni kraft, signing og náði. Bøn broytir ein persón, tí Gud hevur myndugleika at broyta.

Bill Hybles, sum er pastorur í Willow Creek samkomuni í Chicago, sigur frá, hvat hendi, tá hann lærdi at raðfesta bøn í sínum egna lívi, og hvat hendi, tá hann ásannaði, at hann hevði ov nógv um at vera til at biðja.

Hann skrivar um nærveru Guds, hvussu Gud tekur okkum inn í Sína náði, kraft og signing. Hann skrivar um tey lyfti, ið Bíblian gevur okkum gjøgnum bøn, um ósvaraðar bønir og um, hvussu vit hoyra rødd Guds. Bill Hybles eggjar okkum til at halda á í bønini, at variera bønirnar soleiðis at innihaldið í bønum okkara ikki bara er um okkum sjálvi, men um Hann – at læra at takka Honum, tilbiðja Hann, játta synd fyri Honum og forbøn fyri øðrum. Hann gevur okkum sera praktiskar mátar at gera hetta uppá.

Bókin hevur eisini spurningar til samtalu ella umhugsan í húsbólkum ella annað. Bókin er 180 síður og kann keypast í Logos bókhandli fyri 150 kr.




# Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla



### Sunnudagin 4. februar

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Ávøkstur Andans: Friður.* |
| | *Talari: Ólavur Jøkladal.* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Rómbrævið.* |
| | *Talari: Jógvan Zachariassen.* |

### Sunnudagin 11. februar

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Ávøkstur Andans: Langmóð.* |
| | *Talari: Símun Absalonsen.* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Rómbrævið.* |
| | *Talari: Jógvan Zachariassen.* |

### Sunnudagin 18. februar

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Ávøkstur Andans: Mildleiki.* |
| | *Talari: Jógvan Zachariassen.* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Ein ferð í lovsongi.* |
| | *Talari: Anna Háberg.* |

### Sunnudagin 25. februar

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Ávøkstur Andans: Góðska.* |
| | *Talari: Poul Færø.* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Opið evni.* |
| | *Talari: Poul Færø.* |

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni.*

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*